# Fyrsta forsætisráðharravitjanin í Føroyum

**Fyri fyrstu ferð hevur ein svenskur forsætismálaráðharri vitjað í Føroyum**

VITJAN

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fríggjadagin komu svensku forsætismálaráðharrahjúnini á almenna vitjan í Føroyum. Göran Persson, sum hevur verið forsætisráðharri í Svøríki seinastu tíggju árini og kona hansara, Anitra Steen.

Tey komu við flogfari úr Íslandi og lendu í Vágum beint fyri kl 16 fríggjadagin. Tey fóru beina leið av flogvøllinum á Oyrargjógv, har Froyur hjá Skúvadal lá fyri teimum.

Siglt varð undir Vestmannabjørgini og síðani norður um oyggjarnar til Klaksvíkar, har vinnan tók ímóti teimum við forvitnisligari framsýning av vørum, sum verða útfluttar til Svøríkis.

Seinni bjóðaðu løgmaður og borgarstjórin í Klaksvík til døgurða í Skálanum, og eftir tað koyrdi fylgið gjøgnum undirsjóvartunnilin til Havnar.

Leygarmorgunin varð vitjað í Hvannhaga í Suðuroy, har Petur Karl av Rana greiddi frá.

Á middegi høvdu løgmaður og Göran Persson arbeisdøgurða í Norðurlandahúsinum, og síðani varð vitjað m. a. Listaskálanum.



*Komin av flogvøllinum fór fylgið við Göran Persson beina leið á Oyrargjógv, har báturin Froyur hjá Skúvadal í Vestmanna flutti tey til Klaksvíkar. Leiðin lá fram við náttúruvøkru Vestmannabjørgunum og so norður um oyggjarnar*

Seinnapartin hevði Göran Persson fund við Javnaðarflokkin í Miðlahúsinum, har hann eisini hitti sviar, búsitandi í Føroyum og føroysku fjølmiðlarnar.

Sunnumorgunin støkk Göran Persson inn á gólvið hjá Ríkisumboðsmanninum. Síðani varð gingið gjøgnum gomlu Havnina út í Tinganes, har løgmaður bjóðaði ein morgunmatarbita við góðum føroyskum viðskera og turrum fiski.

Um middagsleitið fór ferðalagið aftur í Vágar, og so var vitjanin hjá Göran Persson av á hesum sinni. Ferðalagið heilt leiðina fram til Grønlands, har tey vitja næstu dagarnar.

# Hitti landsmenn í Hvannhaga

**Tveir sviar, sum lógu í tjaldi í Hvannhaga leygarmorgunin, fingu høvi at hitta teirra egna forsætisráðharra**

VITJAN

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Í Hvannhaga í Suðuroy leygardagin hitti Göran Persson tveir landsmenn sum vóru á tjaldferð í haganum saman við einum føroyingi, sum lesur í Svøríki*

Leygarmorgunin var fylgið við Görani Person á flogi. Farið varð av tyrlupallinum í Havn til Suðuroyar. Tíðin var knøpp, so flogið varð beinleiðis í Hvannhaga. Men fyrst varð flogið inn eftir Trongisvágsfjørði og inn í Rangabotn fyri at vísa honum økið við kolaminunum.

– Í talu míni fyri gestunum í Klaksvík fríggjakvøldið greiddi eg eitt sindur frá um kolagrevsturin í Suðuroy, har ein svensk aðalsdama um aldaskifti ár 1900 hevði rættindini til kolagrevstur. Tá komu nógvir sviar hendavegin at arbeiða, bæði sum handverkarar og sum kolanámsarbeiðarar, greiðir Jóannes Eidesgaard, løgmaður frá.

Í Suðuroy eru nógv eftirnøvn, sum stava frá hesum monnum, nøvn sum Persson, Carlsson, Viberg, Ågeson o. s. fr., sigur løgmaður.

– Vit flugu so yvir um til norðraru síðuna og settu okkum niður har. Vit høvdu gjørt avtalu við Petur Karl av Rana um at greiða forsætisráðharranum frá um hagan, tí hann er frágera góður frásøgumaður, sigur Jóannes Eidesgaard.

Síðani gekk fylgið niður til vatnið í Hvannhaga og fingu har ein kaffimunn.

Har sóu tey eitt svenskt flagg, og vísti tað seg at verða ein føroyingur, sum lesur í Svøríki, sum saman við tveimum svenskum vinmonnum vóru farnir í hagan við tjaldi, og høvdu passað tað soleiðis, at sviarnir sluppu at hitta sín egna forsætismálaráðharra – langt av landi skotnir í Føroyum.

Teir fingu eitt hugnaligt prát við Göran Persson og konuna Anitru Steen.

Eftir túrin í Hvannhaga fór ferðalagið aftur til Havnar. Næst á skránni var ein arbeiðsdøgurði í Norðurlandahúsinum í Havn.

– Hetta var sjálvandi ein stuttur og skjótur túrur í føroysku náttúruni, men eg haldi, at hetta gav teimum eitt gott innlit í føroysku náttúruna, sigur Jóannes Eidesgaard.